# eitt stórt vónbrot fyri meg



*Hann eigur nógv sporini úteftir bryggjuni og inn á skrivstovuna á Bryggjubakka, har hann legði lív og sál í virksemið sítt fyri fiskimenn. Nú er hesin 36 ára langi túrur lokin, og nýggjur maður er á brúnni. Í hesi samrøðu takkar Óli Jacobsen fiskimonnum fyri hesi mongu ár – og eina serliga tøkk veitir hann teimum, sum hildu út heilt til endan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

> **Skattalættin hevur seinastu 9 árini givið sjófólki meira enn eina hálva miljard krónur. Hetta svarar til, at skattalættin hevur givið hvørjum manni upp til stívliga 300.000 krónur hesi árini…**

> **Longu fyrsta dagin skapti nýggi formaðurin iva um støðuna hjá Føroya Fiskimannafelag í skattaspurninginum. Tað er ein gloypibiti hjá teimum mongu, sum vilja beina fyri hesi skipan hjá fiskimonnum…**

Hann heldur, at tað er einki fakfelag sum so dyggiliga hevur kunnað sínar limir, sum FF hevur gjørt, tí aðru hvørja viku hava fiskimenn fingið FF-blaðið umborð við eitt nú kunning um sjónarmiðini og virksemi hjá felagnum á mongum økjum.

- Aftrat hesum fingu fiskimenn eina ferð árliga eina drúgva ársfrágreiðing. Alt hetta finst eisini á alnetinum, men um alt hetta ongan týdning hevði - ja, so gerst ikki við, sigur Óli og leggur aftrat, at nú sleppa fiskimenn so undan hesi kunning, tí nú kemur heldur einki regluligt fiskimannablað út.

### Hálva miljardin – ongan týdning?

- Fiskimenn merkja á hvørji avrokning og útgjalding tann skattalætta, sum FF og eg sjálvur í fremstu røð havi verið við til at útvega teimum sum løgtingsmaður og samgongulimur í 1997. Hesin skattalætti hevur seinastu 9 árini givið fiski- og sjómonnum meira enn eina hálva miljard krónur. Skattalættin hevur givið hvørjum manni upp til meira enn 300.000 krónur hesa tíð og kemur - alt annað líka - framhaldandi at geva upp til 35.000 krónur.

Óli vísir á, at henda skipan samstundis hevur verið samfelagsins viðurkenning av okkara siglandi fólki.

Hann heldur, at hóast formella eftirlønarskipanin kanska ikki enn er nóg góð, eru hetta upphæddir, sum geva fiskimonnum munandi betri møguleikar enn aðrir bólkar at tryggja seg sjálvan, eitt nú við pensjón. Ikki minst, tá ið vit vita, at ein bøtt pensjónsskipan undir øllum umstøðum skal vera fíggjað av tí einstaka.

- Tað er eisini alment kent, at eg sjálvur og FF hava barst manniliga fyri at varðveita hesa skipan móti teimum ógvusligu álopum, sum henni hevur verið fyri. Soleiðis kann eg enn einaferð nevna TV2-málið í 2004 sum vísti, hvørjar kreftir fiskimenn eru uppi ímóti, sigur Óli Jacobsen.

### Ivi um skipanina

Fyrrverandi formaðurin í FF sigur, at longu fyrsta dagin skapti nýggi felagsformaðurin við sínum mótstríðandi útsagnum iva um støðuna hjá felagnum í hesum spurningi.

- Hetta gjørdi hann í fyrsta lagi við at "niðurtóna" týdningin av skattaskipanini - og í øðrum lagi við at siga, at hon er ein forðing fyri øðrum batum fyri fiskimenn á mongum økjum. Hetta er eitt sjónarmið, sum er grundað á fullkomiligan ókunnleika til veruligu viðurskiftini, og tað er óneyðugt at siga, at hetta er ein gloypibiti hjá teimum mongu, sum vilja beina fyri hesi skipan hjá fiskimonnum. Ikki minst nú visjónsbólkur hjá løgmanni aftur hevur lagt fram uppskot um avtøku av skattaskipanini hjá sjófólki.

Almenningurin fekk soleiðis longu fyrsta dagin í fjølmiðlunum eina - eftir øllum at døma - rætta fatan av førleikunum hjá nývalda formanninum, og tað er ikki meira at siga um tað, heldur Óli fyri.

Høvuðsgrundarlagið undir virkseminum hjá FF er sáttmálin, sum er grundaður á ein ásettan prosentpart til manningina.

- Vit hava sjálvsagt roynt at hava hendan partin so høgan sum gjørligt. Men samstundis er umráðandi, at veiðan ber til, tí annars verða eingi arbeiðspláss til fiskimenn. Aftrat hesum hava vit eisini lagt okkum eftir at gera sáttmálar, sum kunnu geva mest møguligt til manningina, hóast talan kann vera um lægri prosentpart.

Óli vísir á, at hetta serliga hevur eydnast fyri nótaflotan, har daglønin við teimum nýggjaru skipunum í miðal er 5 arbeiðaradaglønir á 900 krónur, sum aftur er nógv tann størsta inntøkan í fiskiflotanum og kanska í samfelagnum yvirhøvur.

- Nú frætti eg, at tað vóru fiskimenn, sum vildu hava nýggjan formann, tí teir ikki fáa seks daglønir hjá arbeiðarum um dagin, sigur ein undrandi fyrrverandi felagsformaður.

### Tøkk fyri tíðina

– Hetta er ikki fyrstu ferð í søguni, at tú við eitt val ikki fær viðurkenning fyri tað, sum er gjørt – og hvussu nógv tað enn er. Tó eri eg takksamur fyri, at vanlig skilafólk í hópatali, bæði kend og ókend, framvegis hava víst mær sín fulla stuðul og álit.

Í samrøðuni nýtir Óli høvi at takka hesum fólkum fyri stuðul og álit.

– Eg vil eisini einaferð nýta høvið takka fiskimonnum fyri ta tíð, eg havi arbeitt fyri tykkum – og heilt serliga vil eg nýta høvi at takka teimum, sum hildu út til endan og sum tóku støðu út frá veruligu royndunum, teir hava havt av FF í míni tíð, sigur Óli Jacobsen, fyrrverandi fiskimannafelagsformaður, í samrøðuni.